almannaverkið

Fíggjarmálaráðið
TinganesPostboks 2039
100 Tórshavn

Tórshavn, tann: 13. februar 2023
J.nr.: 000.K04-0053/23-5
(at tilskila í svari)

Tygara skriv.: 21/07135

Viðgjørt: Janus Hentze í Stórustovu

Uppskot til løgtingslóg um Mínboks

Almannaverkið hevur tann 16. januar 2023 móttikið uppskot til løgtingslóg um almenna talgilda postskipan til hoyringar. Eitt av endamálunum við lógaruppskotinum er at áseta krav um, at almennir stovnar skulu samskifta umvegis Mínboks, um hesir senda viðkvæmar persónsupplýsingar ella trúnaðarupplýsingar talgilt til síni viðskiftafólk.

Almannaverkið skal viðmerkja, at sum støðan er í dag er teldupostsamskifti tann mest nýtti hátturin í samskiftinum millum borgara og Almannaverkið. Í fjør viðgjørdi Almannaverkið 19.000 umsóknir, og stórt sæð allar hesar umsóknir vórðu móttiknar umvegis teldupost. Av hesum 19.000 komu 1.100 umvegis Vangan.

Tá Almannaverkið hevur tikið avgerð í einum máli, verður avgerðin altíð send borgaranum við annaðhvørt vanligum posti ella umvegis Mínboks. Nógv samskifti kann tó verða millum Almannaverkið og borgaran í málsviðgerðartíðini, áðrenn ein endalig avgerð verður tikin. Talan kann eisini verða um, at t.d. foreldur hjá barni við autismu boða frá umvegis teldupost, at barnið ikki fær møtt orsakað av sjúku. Hetta samskifti gongur í dag fyri seg við vanligum telduposti. Almannaverkið kann ikki framyvir svara hesum foreldrum við telduposti, av tí at talan er um viðkvæmar upplýsingar, at barn teirra fær tænastu frá Almannaverkinum vegna autismu. Somuleiðis um t.d. ein fyritíðarpensjónistur spyr í telduposti nær pensjónin kann væntast á konto, ber heldur ikki til at svara við telduposti, av tí at viðkomandi fær peningaliga veiting av heilsuávum.

Mínboks er ikki tøkniliga egnað til samskifti millum okkara starvsfólk og borgarar, tí Mínboks er samskifti við sjálvan stovnin. T.v.s., at boð, sum Almannaverkið fær í Mínboks fer inn á ein boðkliva, har boðini síðan verða býtt út til ávísu starvsfólkini. Skulu starvsfólkini hjá Almannaverkinum svara einum boðum, sum koma inn umvegis Mínboks, skal eitt formligt skriv gerast, ið verður sent borgaranum aftur. Almannaverkinum kunnugt inniheldur Mínboks ikki møguleikar fyri óformligum og smidligum samskifti millum stovnin og borgaran.

Borgarar og Almannaverkið nýta sostatt teldupostsamskifti til skjótt og smidligt samskifti, har skjótt svar væntast. Almannaverkið móttekur munandi fleiri teldupostar frá borgarum enn telefonuppringingar á høvuðsnummarið. Við hesum uppskoti verður Almannaverkið í stóran mun avmarkað í sínum samskifti við borgarar, av tí at alt samskifti framyvir skal í Mínboks, og tað óformliga samskifti, sum í dag gongur fyri seg umvegis teldupost, framyvir annahvørt skal gerast umvegis telefon ella vanligan post.

Tá borgarar senda teldupostar til Almannaverkið um ymisk viðurskifti í málum teirra um veitingar ella tænastur, verður skjótt svar væntað frá Almannaverkinum. Mett verður ikki, at endamálið við lógaruppskotinum stendur mát við ynski og tørvin hjá borgarum til skjótt og smidligt samskifti.

Almannaverkið metir, at uppskotið í stóran mun fer at ávirka tænastustøði hjá Almannaverkinum, av tí at tað verður truplari hjá borgarum at samskifta við Almannaverkið. Avleiðingin verður ein bæði longd og tyngri málsviðgerðartíð, og at Almannaverkið fær truplari við at halda upplýsingar- og ráðgevingarskylduna.

Vegna Almannaverkið

Janus H. í Stórustovu
fulltrúi